Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Royndir við restum frá betongi til at kálka jørð

Spurningar:

1. Hvat vístu royndirnar, sum í 2021 vórðu gjørdar við at brúka restbetong til at kálka jørð við?
2. Væntar landsstýrismaðurin, at hetta er ein loysn, sum føroyskir bøndur kunnu brúka til at økja pH-virðið í jørðini og harvið fáa framleitt meira stráfóður við somu ella minni nýtslu av innfluttum kunsttøðum?

Viðmerkingar:
18. juni 2021 var eitt innslag í Degi & Viku um royndir við at brúka restbetong til at kálka jørð og á tann hátt hækka pH-virðið, so jørðin gerst minni súr og harvið betur før fyri at taka taðingarevni til sín.

Greitt varð frá, at á fýra økjum á 1.000 fermetrar hvørt var ávikavist: 1) bara kálkað; 2) kálkað og taðað; 3) bara taðað; 4) einki gjørt.

Umboð fyri Búnaðarstovuna greiddi frá, at áðrenn annað varð gjørt, vórðu moldroyndir tiknar í teimum fýra økjunum. Eftir slátturin skuldu síðani nýggjar royndir takast fyri at síggja, um jørðin hevði tikið føðslu til sín, og skuldi hetta geva fyrstu ábendingarnar um úrslitini av royndunum við restbetongi. Roknað varð tó ikki við at síggja ordiliga ávirkan fyrr enn eftir eini fýra mánaðum, og tí skuldu moldroyndir takast aftur á vári í 2022.

Víst varð á, at jørðin í Føroyum er ógvuliga súr, men at kálk kann lyfta pH-virðið, so jørðin verður betur egnað til gras og grøði. Vónað varð, at royndirnar við restbetongi kundu slóða fyri at fáa bæði meira og betri gras, og at fáa betri nyttu burturúr bæði mykju- og kunsttøðum. Eitt úrslit av hesum kann so verða, at innflutningstørvurin minkar á bæði stráfóðri og kunsttøðum.

Á Løgtingi, 10. mai 2023

Eirikur í Jákupsstovu